skemt

# Bókaútgáva




Frá at vera eitt vanligt blaðhús, hevur Sosialurin ment seg nógv seinnu árini. Og nú eru vit eisini farin at geva bøkur út. Soleiðis imynda vit okkum í øllum førum, at ein bókaútgáva sær út, tá bókin verður givin út gjøgnum vindeygað

# Nýggj fløga á gøtuni



Nú ein dagin kom ein spildurnýggj og enntá óbrúkt fløga út á Havnar gøtur

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði brævs- og telduposti.*

**Neyðtøka**
»Russiskir herðmenn tóku samkynd við megi«
www.uf.fo

**Væl sæð**
»Eyðun Klakstein: - Innflutningurin er minkaður ein triðing. Hvat sigur hetta um føroyska samfelagið?
Hermann Oskarson: - Fyrst av øllum, er tað ein øgilig minking!«
Ras2

**Innrættað av nýggjum**
»Barbara í Gongini í Müllers pakkhúsi«
Sosialurin

**Helst var tað Braveheart**
»54-ára gamli Velupillai Prabhakaran varð eftir øllum at døma dripin av skotum, tá hann royndi at flýggja undan stjórnardeildum«
www.uf.fo

**Hvar er kettan?**
»Vit harmast misstakið«
Dimmalætting

**Ov lætt um tað var øvut**
»Tit skapa fleiri møguleikar, enn tit fáa mál«
Spurt í 3-2 í Sjónvarpinum

**Hjálparpakki til autolakk**
"Obama krevur grønari bilar"
www.portal.fo

**Oyðsla við prosentum**
"Eitt einkult A4 ark í einum A4 brævbjálva eigur at kosta 8 krónur - men TAKS rindar 10 krónur ístaðin. Tað svarar til eina yvirfrankering upp á 33%"
Dimmalætting

**Annars kemur hon neyvan**
»...lakssild kemur í trolið, um hon er til steðar«
Sosialurin

